

*Tað verður skipað fyri eini tvørkirkjuligari stuðulskonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum leygarkvøldið*

*Savnsmynd*

# Tvørkirkjulig stuðulskonsert

**Leygarkvøldið verður skipað fyri tvørkirkjuligari stuðulskonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum**

STUÐUL
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í hesum døgum verður skipað fyri innsavnan til fjareystur á ymsan hátt. Og soleiðis verður eisini gjørt í Nes kommunu. Har verður nevniliga skipað fyri tvørkirkjuligari stuðulskonsert leygarkvøldið klokkan 19. Hon verður hildin í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Frá Nebo luttaka bæði barna- og kvinnukór. Missiónshúsið er umboðað av Taborkórinum, Petur Hans og fleiri, og frá samkomum úr Eysturoynni luttekur sangbólkurin SALT. Frá Fríðrikskirkjuni luttekur kirkjukórið.

Marin R. Jacobsen, prestur, fer at prædika, og Símin í Túni fer at greiða frá royndum undir líknandi umstøðum.

Bygdaráðið í Nes kommunu hevur í sambandi við konsertina gjørt av, at lata ein stuðul uppá 10 krónur fyri hvønn borgara til hjálpiarbeiði í teimum vanlukkuraktu økjunum.

Allur peningurin, ið verður latin á stuðulskonsertini, fer óskerdur víðari til Reyða Kross.




*Ferðafólkatalið um Vága Floghavn setir met aftur í ár*

*Savnsmynd*

# Enn eitt metár

**Aftur í ár er ferðafólkatalið um Vága Floghavn størri enn nakrantíð**

MET
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í 2004 ferðaðust tilsamans 166.333 fólk um flogvøllin í Vágum. Hetta er størsta talið nakrantíð av ferðandi eitt einstakt ár. Til samanberingar kann nevnast, at tilsamans ferðaðust minni enn 160.000 fólk um flogvøllin fyrstu 11 árini.

Í mun til 2003 hækkaði ferðafólkatalið við 2,1%.

Høvuðsfarleiðirnar til Danmarkar eru serliga tær, ið bera vøksturin. Økingin á hesum farleiðunum er 5,2%, meðan størsta afturgongdin hevur verið á leiðunum til Bretlands, nevniliga 29,6%.

# Michala Petri til Føroya

**Heimskendi blokkfloytuspælarin, Michala Petri, vitjar nú aftur í Føroyum saman við manni sínum Lars Hannibal**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Michala Petri vitjar nú aftur í Føroyum saman við manni sínum, Lars Hannibal*

*Savnsmynd*

Saman við manninum, gittarleikaranum, Lars Hannibal, vitjar blokkfloytuspælarin, Michala Petri nú í Føroyum. Tey fara at hava tvær konsertir ávíkavist í Klaksvík og í Havn.

Michala Petri hevur fyrr verið í Føroyum og havt konsertir. Hon er kend sum undurbarnið á blokkfloytuni, og sum smágenta ferðaðist hon kring allan heim og spældi. Hópin av innspælingum hevur hon eisini verið við í, og tað er við stórum og navnframum leiðarum og orkestrum. Millum annað samstarvar hon við English Chamber Orchestra.

Tað er konsertfelagið, sum skipar fyri konsertunum við hjúninum. Tey eru liður í jubileumsárinum hjá felagnum, ið skipar fyri klassiskum konsertum.

Konsertirnar við Michalu Petri og Lars Hannibal vera leygardagin 15. januar kl 16 í Læraraskúlahøllini og sunnudagin 16. januar í Ósáskúlanum í Klaksvík.

Atgongumerki eru at fáa á Kunningarstovunum í Tórshavn og Klaksvík og verða annars at fáa við dyrnar.

# Malmros og Terkelsen heiðrað

**Týsdagin fingu Nils Malmros og Ulla Terkelsen ávikavist heiðurs- og journalistvirðislønirnar hjá Berlingska Grunninum. Móttøkan var tó avlýst orsakað av vannlukkuni í Asia. Nevndin fyri grunnin valdi í staðin at lata 100.000 kr til innsavningina til offrini**

VIRÐISLØNIR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Nils Malmros*

Tað vóru tveir Århusianarar, sum vórðu heiðraðir á føðingardegnum hjá Berlingske tidende í gjár. Filmsleikstjórin og læknin, Nils Malmros, sum hevur sett heimbýin á kortið við sínum lýsingum av barna- og ungdómsárunum í Århus, og uttanlandatíðindakvinnan, Ulla Terkelsen, sum hevur havt alt Europa sum sítt arbeiðspláss við støði í TV2, skrivar Berlingske Tidende.

Um filmsleikstjóran segði Oluf Engell, formaður í stýrinum fyri Berlingska Grunnin, millum annað:

"Malmros hevur vent sær burtur frá tankanum um eina danska filmskanon, men tað er ongin ivi um, at hann er sjálvskrivaður til listan yvir 10 teir bestu donsku filmarnar".

Vegna eitt samt dómarapanel grundgav fyrrverandi uttanríkismálaráðharrin og ritstjórin, Uffe Elleman-Jensen, fyri, hví Ulla Terkelsen varð vald at fáa Tann Berlingska Journalistprísin. Hann segði millum annað:

"Hon endurgevur veruleikan, sum hon sær hann. Síðani kann ein og hvør gera sær sínar egnu niðurstøður. Soleiðis ger ein góður journalistur. Og sum Ulla einaferð hevur sagt: "Eg arbeiði ikki sum journalistur. Eg eri journalistur."

Virðislønirnar vórðu handaðar á føðingardegnum hjá Berlingske Tidende týsdagin, men orsakað av vanlukkuni í Asia valdi Det Berlingske Hus at avlýsa hátíðarhaldið, og í staðin lata 100.000 kr til hjálpararbeiðið í vanlukkuøkinum.

# Nýggjan formann og nýtt stýri

**Á stýrisfundi í gjár valdi Kommunusamskipan Føroya, stytt KSF, nýtt stýri**

Nýggjur formaður er Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, og næstformaður er Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

Stýrið valdi eisini nýggj umboð í Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Tey eru Kristin Michelsen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu, Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vágs kommunu og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Jens Marius Poulsen kommunustjóri í Tórshavnar kommunu varð afturvaldur starvsbólkaformaður.

Í Kommunusamskipan Føroya eru Klaksvík, Fuglafjørður, Runavík, Tórshavn, Tvøroyri og Vág ur.

KSF er skipað við einum stýri, ið tekur avgerðir, einum starvsbólki, ið fyrireikar mál til stýrið og eini skrivstovu, ið samskipar virksemi og útinnir avgerðirnar hjá stýrinum.

Endamálið hjá felagnum er at virka fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði.